# Hoyggjhús brendi í grund

Løgreglan í Suðuroy sigur, at eisini har hevur verið sera friðarligt um jólini. Fyri jól kom eldur í eitt hoyggjhús í Vági. Talan var um eitt gamalt hoyggjhús, og eldurin var so mikið stórur, at húsið brendi í grund.

1. jóladag koyrdi ein ungur dronur út av í Trongisvági. Bilurin bleiv vrak, men drongurin slapp við smávegis snuddum. Helst var ov nógv ferð orsøkin til óhappið.

Løgreglan í Eysturoynni hevði onki at gera um jólini, verður sagt úr Runavík. Dansur var í fleiri støðum í oynni, men allastaðni skikkaðu fólk sær væl. Tey vóru í góðum lag og hugnaðu sær í býnum langt út á náttina.

- Tað hevur verið óalmindiliga friðarligt her um jólini, sigur vakthavandi í Runavík.



## Friðarligt um jólini

**Løgreglan í Havn sigur, at tað hevur verið stak friðarligt um jólini**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*

Sagt verður frá løgregluni, at jólini hava verið stak friðarlig. Nøkur vóru tó, sum ikki lótu bilin standa, hóast tey høvdu drukkið. Og fýra fólk fáa ein treytaðan dóm upp á koyrikortið orsaka av ov nógvari ferð.

Ein hevði fingið ein lúsing og varð koyrdur á sjúkrahúsið, men hann var so ávirkaður, at viðkomandi visti slettis ikki, hvat veruliga var hent. Og onkur smávegis herverk hava verið eisini, men tað hava fólk so ornað sínámillum.

Á Velbastað hava leysir hundar gjørt seg inn á seyð. Tveir seyðir vórðu bitnir til avlívs, meðan fleiri aðrir vórðu skaddir. Eigararnir hava tó ornað viðurskiftini sínámillum.

Vakthavandi á løgreglustøðini upplýsir, at tað hevur verið eitt ótal av uppringingum um líkt og ólíkt. Summi ringja fyri at klaga, summi tí tey eru á ein ella annan hátt komin til skaða og tørva hjálp. Onnur ringja bert fyri at práta, tí tey sita einsamøll og hava ongan annan at práta við, meðan uppaftur onnur bara ringja fyri at skelda.

- Hóast gott veður var og nógv fólk var úti, so skikkaðu tey sær heilt væl um jólini, sigur vakthavandi.

## Færri akfør skrásett

**Hagtøl frá Bileftirlitinum vísa eina lækking í tølunum fyri skrásettum akførum í Føroyum**

AKFØR
*Solby A. Eliasen*

Bileftirlit Føroya hevur gjørt hagtølini fyri skrásetting av akførum upp. Hagtølini vísa, at samlaða skrásetingin av nýggjum og brúktum innfluttum akførum í 2002 var 2.490 akfør í mun til 2.503 akfør í 2001. Hetta er sostatt ein afturgongd upp á 13 akfør svarandi til 0,5 %. Harumframt er samlaða talið av innfluttum brúktum akførum í 2002 398 í mun til 2001, tá talið var 500. Hetta er ein afturgongd upp á 20,4 %.

Men havast skal her eisini í huga, at Bileftirlitið í 2002 er farið undir at skráseta prutl eisini.

Onkur hevur tikið til, at føroyingar skifta bil sum onnur skifta hosur, og tølini hava verið støðugt vaksandi í fleiri ár, men nú letur til, at stígur er komin í.

Staðfestast kann so í øllum førum, at færri bilar vórðu keyptir í 2002 í mun til 2001.

So er spurningurin um hetta verður ein varandi gongd, ella um tað bert er komin ein fyribils stígur í.

# Tann einfalda byrjanarsíðan

INTERNET
*Tíðindaskriv*




Internetveitarin TeleTech, sum í trý ár hevur veitt skjótt tráðleyst internet til privat og virkir, hevur í fleiri umførum gjørt kanningar hjá kundum sínum, um ynski teirra til ein arbeiðsportal. Eftir hesar kanningar varð greitt, hvat ein slíkur portalur átti at innihildið, og heittu vit á fyritøkuna Tera í Saltangará um at útvikla ynski kundans til eitt gott arbeiðsamboð. Tera setti Martin Antoniussen at útføra uppgávuna.

Fleiri av kundum TeleTech`s hava royndarkoyrt www.leita.fo, og hon er síðani snøggað til eftir ynski teirra. Úrslitið er eitt gott prógv um eitt felagsátak frá kundaskaranum hjá TeleTech.

Í vikuni kom so nýggi arbeiðsportalurin út á Internetið. Tað, sum er sermerkt við www.leita.fo, er, at allar funktiónir, sum vit øll leita eftir á ymsum heimasíðum, eru á somu síðu. Ikki kann sigast annað enn, at her er vunnið á tí trupulleika, sum tað er, at leita í blindum eftir portalum og heimasíðum o.l á ymsum síðum.

**E-post leitarin**
Á www.leita.fo kann leitast eftir e-posti hjá post.olivant.fo, hjá kallnet.fo og hjá teletech.fo á somu síðu. Einfalt og lætt!

**Lurta eftir útvarpi, sjónvarpi ella Løgtinginum**
Um kundin hevur eitt ynski um at lurta eftir Útvarpi Føroya ella síggja Sjónvarp Føroya, so er ómaksleyst at leita tað fram. Men summi fólk eru meira til politik enn onnur, og lurta tí møguliga eftir politiskum dundurtalum frá Torbjørn Jacobsen, ja so er møguleikin eisini her.

**Telefonnummur og Web-kamera**
À www.leita.fo er eisini møguleiki at leita eftir øllum telefonnummurum í Føroyum, og ikki minst er møguleiki at »hyggja« eftir veðrinum í Klaksvík og í Havn við Web-kamera.

**SMS-boðsendarin**
SMS-boðini eru eitt av tí mest einfalda, sum www.leita.fo hevur gjørt, so her er eitt amboð til øll.

**Bjálkin**
Ein »bjálki« er ovast á síðuni, sum hevur portalin olivant.fo og aðrar góðar portalar. Bløðini hava eisini fingið sítt ból á síðuni eins og kristiligar heimasíður hava fingið serliga stóra rúmd í bjálkanum. Undirhald fyri ungdómin hevur »uppfinnarin« ikki gloymt, so nakrar síður eru til hansara í »bjálkanum« og í sjálvum innihaldinum

**Skráset ókeypis**
Ikki minst er eitt rútur niðast, har øll ókeypis kunnu skráset sína og aðrar heimasíður.

**Lýsingar**
Lýsingarprísurin á www.leita.fo er til ein hvønn pengapung - ring 317 265 ella fax 320 548.

Sum Robert og tey í Sortudíki plaga at taka til: Tað er so nógv lættari… á www.leita.fo



# Vøksturin minkaður á jólasøluni

**– Vit hava seinastu seks mánaðirnar generelt merkt ein lægri vøkstur í søluni í mun til undanfarin ár, men talan er ikki um nakra niðurgongd, sigur Niels Mortensen, stjóri fyri SMS**

SØLA
*Heri á Rógvi*



*Hugurin og miðlarnir at keypa nógv og gott inn til jóla bila einki. Men ábendingar eru um, at vøksturin minkar støðugt, og ein stagnering hómast*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Seinnu árini hevur tað gingið við tí rúkandi ferð uppeftir í føroyska búskapinum og við føroysku nýtsluni, men nógv bendir nú á, at vøksturin lækkar mundandi.

Seinnu tíðina hava vit hoyrt úttalilsir um, at vøksturin nú fer at minka, og samfelagshjólini aftur fara at mæla spakuligari.

Jólasølan í ár vísir, at vøksturin er minkaður á nýtsluni. Men talan er kortini ikki um nakra niðurgongd.

Niels Mortensen er stjóri fyri SMS, sum er størsta sølumiðstøð í landinum og eigur nakrar av størstu handlunum í landinum.

Hann sigur, at teirra handlar hava merkt, at tann sami vøksturin, sum áður hevur verið at sæð, ikki ger seg galdandi longur.

– Vit hava seinastu seks mánaðirnar generelt merkt ein lægri vøkstur í søluni í mun til undanfarin ár. Tendensurin er, at tað javnar seg meira út, og tað hava vit eisini sæð í jólasøluni.

Men Niels Mortensen letur ógvuliga væl at søluni á jólum í ár.

– Jólasølan kom seint ígongd, men hon hevur verið góð, og hon hevur nokk verið eitt lítið sindur størri enn undanfarna ár, sigur Niels Mortensen.

Tendensurin er generellur á øllum økjum. Fyri handlarnar í SMS er tað ymiskt, hvør vøksturin hevur verið, og tað ber illa til at geva eina neyva lýsing, sigur Niels Mortensen.

Hann dugir heldur ikki at siga, hvussu tað ber til, at jólasølan kom so seint ígongd.

Finn Nielsen, stjóri fyri Føroya Keypssamtøku, sigur, at teir eisini hava merkt ein vøkstur í ár, og tað sama er galdandi í jólamánaðinum.

– Vit selja matvørur, og vit eru oftast ikki teir fyrstu, sum merkja, at fólk hava minni pengar millum hendurnar, sigur Finn Nielsen.

**Kenna stagnering**
Á Vøruhúsinum á Hjalla, sum eisini er ein av størstu handlunum í landinum, lata tey stak væl at jólasøluni. À Hjalla verður mangt og hvat selt, og klára fatanin á Hjalla er, at fólk hava meira pening um hendurnar, enn tey kanska høvdu fyri 5-7 árum síðani.

– Tendensurin vísir eina lítla stagnering, sigur Birgir av Vollanum, deildarleiðari á Vøruhúsinum á Hjalla.

Hjá teimum byrjaði jólasølan miðskeiðis í november, og hon hevur síðani vundið upp á seg.

Áhugin at keypa størru og dýraru lutirnar er eisini til staðar, og hetta sæst serliga til síðst í keypstíðarskeiðinum.

**Síðsta vikan**
Niels Mortensen vil ikki siga nakað um, hvussu nógv, teir selja fyri á jólum, men hann dylir ikki fyri, at talan er nógvir milliónir, sum skiftir hendur dagarnar undan jólum.

– Tann síðsta vikan undan jólum er nógv tann besta í árinum, og vit hava nógva sølu tað mesta av desember mánað, men so minkar sølan nógv í januar og februar, tá fólk tykjast at halda aftur, sigur Niels Mortensen.

Tað sama er galdandi fyri hinar handlarnar, vit hava tosað við.

# Ókeypis DR

**Restina av árinum ber til at siggja DR ókeypis hjá Canal Digital**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Fyri danir í Suðurevropa og serliga Spania er ein rás kallað DR Sydeuropa stáplað upp á beinini.

Hendan rásin er at síggja hjá Canal Digital, og hon er ókeypis restina av árinum.

Rásin vísir tað sama, sum DR1 vanliga vísir.

Eftir nýggjár má gjaldast fyri rásina, og tá verður prísurin umleið 2.000 kr. fyri eitt ár.

Í løtuni samráðist Televarpið um at fáa føroyska prísin longur niður enn hann hjá dønunum í Spania.

Enn er óvist nær Televarpið kemur við Danmarks Radio 1 og 2. Canal Digital kann bjóða rásirnar fyri ein prís, sum er nakað omanfyri 2.000 kr.

Aksel Haraldsen, dagligur leiðari hjá Televarpinum, upplýsir, at teir samráðast ikki í løtuni við Danmarks Radio, men tað er leiðslan hjá Danmarks Radio, sum skal taka støðu til nakrar prinsipiellar spurningar. Hesir snúgva seg serliga um, hvussu sendinetið hjá Televarpinum skal uppfatast av reglunum hjá Danmarks Radio. Higartil eru ongar greiðar reglur á økinum.

## Parabol í jólagávu

**Sølan av parabolum gongur sum heitt breyð fyri tíðina, og rættilig kapping er millum veitararnar**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Jólagávan til húski – síggja vit burtur frá Landastrok – hevur í stóran mun í ár verið parabol útgerð. Serliga í høvuðsstaðarøkinum hevur áhugin verið stórur.

Rás Tórshavn er farið í søguna, og tí kenna nógv fólk í høvuðsstaðnum.

Eftir hvat skilst er áhugin fyri parabolum og haldum hjá Canal Digital øgiligur. Onkur handil hevur ikki kunnað fylgt við eftirspurninginum, sum hevur verið í jólamánaðinum.

Canal Digital hevur tikið kappingina upp við Televarpið í Føroyum. Canal Digital er m.a. komið við einum tilboði upp á móttakarar, sum uttan iva hevur styrkt teirra støðu á marknaðinum.

Hóast vit hava staðiliga roynt, so hevur ikki eydnast okkum at fingið eina viðmerking frá Canal Digital. Tað einasta, vit hava fingið upplýst, er, at Canal Digital hevur merkt ein stóran áhuga og vøkstur í kundatali.

**950 kundar**
Aksel Haraldsen, dagligur leiðari fyri Televarpið, upplýsti mánamorgunin, at talið av kundum hjá teimum var 950. Hetta eru tey hjá Televarpinum væl nøgd við.

– Vit eru hvørki nakað jóla- ella stutttíðarprosjekt. Talan er um eitt nýtt sendinet og nakað, ið fólk skulu venja seg við.

Kundarnir eru fyri tað nógva í Havn, men teir eru eisini nakrir í Eysturoynni.

Àvísir tekniskir trupulleikar hava verið, men hesar finnist væntandi ein loysn innan stutta tíð, metir Aksel Haraldsen. Hann nevnir, at teir fara at uppgradera móttakararnar. Hetta arbeiðið fara fólk kortini ikki at merkja tað nógva til, tí uppgraderingarnar verða gjørdar umvegis netið og krevja einki av fólki.